ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

18. desember 2023
Mál: 23/01350

Fylgiskjal 1

Ummælisskjal

viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um Brekumboð

Uppskot til løgtingslóg um Brekumboð varð lagt til almenna hoyring á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri tann 10. mai 2023.

Harumframt fingu hesi uppskotið til ummælis:

Kommunufelag Føroya
Stjórnarráðini við áheitan um at senda til viðkomandi undirliggjandi stovnar
MEGD við áheitan um at senda til limafeløgini
Heilsuhjálparafelag Føroya
Heilsurøktarafelag Føroya
Føroya Pedagogfelag
Føroya Lærarafelag
Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar
Starvsfelagið
Fysioterapeutfelagið
Føroya Ergoterapeutfelag
Sosialráðgevarafelag Føroya
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Landsfelag Pensjónista
Almannaverkið
Dugni
Sjóndeplin
Fountainhúsið
Dátueftirlitið
Fosturforeldrafelagið
Vinnuhúsið
Løgtingsins umboðsmaður
Føroya Kærustovnur
Javnstøðunevndin

Freistin at koma við viðmerkingum var 10. juni 2023.

Ummælissvar eru komin frá Løgtingsins umboðsmanni, Fíggjarmálaráðnum, Kommunufelagnum, MEGD, Felagnum Hoyr, Landsfelag Pensjónista, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag og Sosialráðgevarafelag Føroya.

Harumframt hava Heilsumálaráðið, Fiski- og samferðslumálaráðið, Umhvørvismálaráðið, Dátueftirlitið og Heilsurøktarafelag Føroya boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Sum úrslit av hoyringini eru gjørdar nakrar broytingar í lógaruppskotinum.

Mest týðandi eru:

- At broyting er gjørd í § 8, stk. 3, ið nágreinar, at starvsfólk í stjórnarráðum og kommunustýrislimir kunnu ikki vera limir í nevndini fyri Brekumboðið
- Samanseting og tal av nevndarlimum
- At tað er nágreinað og umorðað, nær nevndin fyri Brekumboðið kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi

Harumframt eru fleiri nágreiningar gjørdar í viðmerkingunum, millum annað har ummælisskrivini vístu, at okkurt ikki var nóg skilligt.

Í hesum skjali eru serliga innihaldsligu viðmerkingarnar viðgjørdar, eins og at flestu viðmerkingar, sum ikki eru tiknar til eftirtektar, eru umrøddar. Tøkniligar viðmerkingar eru tiknar til eftirtektar, og er lógaruppskotið tillagað samsvarandi, uttan at tað beinleiðis er tilskilað í hesum skjali.

Fyri at síggja ummælissvarini í fullum líki, verður víst til sjálv ummælissvarini, ið somuleiðis eru viðløgd sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Løgtingsins umboðsmaður

Løgtingsins umboðsmaður hevur einans gjørt viðmerkingar til tann partin av lógaruppskotinum, sum viðvíkur virksemi umboðsmansins ella hevur markamót móti virksemi Umboðsmansins.

Umboðsmaðurin metir ikki, at teksturin í almennu viðmerkingunum, ið umtalar virksemi og heimildir umboðsmansins, gevur eina rætta mynd, og vísir í hesum sambandi á, at um broytingar ella nágreiningar skulu gerast í heimildum umboðsmansins, eiga hesar at verða gjørdar í umboðsmannalógini.

Almanna- og mentamálaráðið skal gera greitt, at endamálið við lýsingini í almennu viðmerkingunum er ikki at broyta heimildir umboðsmansins, men at nágreina markamót mótvegis virksemið umboðsmansins, eins og at gera greitt fyri almenninginum, at Brekumboðið og Løgtingsins umboðsmaður hava hvør sítt endamál, virksemi og heimildargrundarlag.

Viðmerkingin um tekstin í almennu viðmerkingunum er tikin til eftirtektar, og er teksturin umorðaður samsvarandi.

Løgtingsins umboðsmaður vísir harumframt á, at ávíst samanfall tykist at vera millum virksemi hjá Brekumboðnum og umboðsmanninum, av tí at Brekumboðið kann biðja um at sleppa at vitja stovnar og støð, har fólk, ið bera brek, eru, og kann biðja almennar myndugleikar um at lýsa

sínar politisku avgerðir og fyrisitingarligar siðvenju á teimum økjum, sum hoyra til myndugleikan.

Almanna- og mentamálaráðið ásannar, at eitt ávíst samanfall er millum virksemið hjá Løgtingsins umboðsmanni og Brekumboðið, men metir, at munur er á endamálinum við virkseminum. Meðan endamálið hjá Løgtingsins umboðsmanni er at viðgera klagur og fremja eftirlit sambært umboðsmannalógini, er endamálið hjá Brekumboðnum at kenna til umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek, við tí fyri eyga at hava eftirlit við at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við breksáttmálan. Brekumboðið er ikki ein eftirlitsmyndugleiki í mun til ávísar stovnar og einstaklingar, men skal einans savna vitan um yvirskipaði viðurskifti.

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tað í uppskotinum stendur, at endamálið er at skipa eina sjálvstøðuga eind, og tekur undir við, at talan ikki verður um ein nýggjan stovn, men at skrivstovuhaldið hjá eindini verður skipað í hóskandi samstarvi við ein verandi stovn ella líknandi.

Landsstýriskvinnan er samd í hesum. Tá lógin er samtykt, verður farið undir at finna hóskandi staðseting.

Kommunufelagið

Kommunufelagið tekur fult undir við yvirskipaða endamálinum við uppskotinum, men hevur tríggjar viðmerkingar til ítøkiliga lógaruppskotið.

Kommunufelagið vísir á, at tað heldur tað vera ein skeiv og óneyðuga dýr loysn at seta á stovn ein sjálvstøðugan almennan stovn til endamálið. Mælt verður ístaðin til, at Brekumboðið, ella uppgávurnar hjá Brekumboðnum, verð/a staðsett/ar hjá Løgtingsins umboðsmanni, og at viðurskifti hjá ætlaða Brekumboðnum, sum ikki kunnu ella eiga at verða lagdar til Løgtingsins umboðsmann, verða loftaðir av verandi myndugleikasamstørvum og áhugafelagskapum.

Landsstýriskvinnan skal í hesum sambandi at vísa á, at talan verður ikki um ein nýggjan stovn. Brekumboðið verður skipað sum ein sjálvstøðug eind, og verður skrivstovuhaldið hjá eindini skipað í hóskandi samstarvi við ein verandi stovn ella líknandi. Sí svar til Fíggjarmálaráðið.

Í tilgongdini at smíða lógaruppskotið, hevur Almanna- og mentamálaráðið (tá Almannamálaráðið) verið í sambandi við Løgtingsins umboðsmann, og umrøtt møguleikan fyri at leggja Brekumboðið undir umboðsmannastovnin. Løgtingsins umboðsmaður mælti frá, at eitt Brekumboð, við teimum uppgávum, sum lógaruppskotið áleggur, verður lagt undir ella hevur tilknýti til umboðsmannastovnin, við teirri grundgeving, at Brekumboðið í virki sínum skal vera talurør fyri ein ávísan málbólk fram um aðrar, og skal vísa á, hvussu samfelagið og lóggávan skal skipast frameftir í hesum sambandi. Hetta verður ikki mett at samsvara við aðalmálini hjá umboðsmannastovninum. Almanna- og mentamálaráðið er samt við Løgtingsins umboðsmanni í hesum. Tá lógin er samtykt, verður farið undir at finna hóskandi staðseting. Tilmæli um staðseting verður ikki tikið til eftirtektar.

Kommunufelagið metir, at samansetingin av nevndini fyri Brekumboðið eigur at verða broytt soleiðis, at kommunurnar hava eitt fast umboð í nevndini. Kommunufelagið vísir í hesum sambandi á, at kommunurnar eru næststørsti arbeiðsgevarin í Føroyum, umsita dagstovna- og eldraøkið, hava nógv borgarasamskifti og standa fyri stórum parti av tí bygging, ið so ella so er ætlað almennari nýtslu.

Landsstýriskvinnan er samd við Kommunufelagnum hesum viðvíkjandi. Tilmælið er tikið til eftirtektar. Sí samlaðu viðgerð av støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið síðst í fylgiskjalinum, undir *Støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið*.

Kommunufelagið metir, at mannagongdin í tilnevningartilgongdini fyri limir í nevndini fyri Brekumboðið er óneyðuga tung, og vísir á, at tey ynskja at varðveita frælsið til at tilnevna tann ella tey, sum Kommunufelagið metir vera skikkað at umboða teirra felag.

Landsstýriskvinnan skal sambært lógini tilnevna umboðini í nevndina við støði í tilmælunum frá ymisku pørtunum. Landsstýriskvinnan metir tað vera umráðandi, at grundgivið verður fyri tilmælinum, so at umboðini kunnu veljast út frá einum upplýstum grundarlagi. Tó er landsstýriskvinnan samd í, at uppruna uppskoti um lýsing er óneyðuga umfatandi. Mett verður nøktandi, at tilmælandi parturin lýsir útbúgving og viðkomandi royndir, tá tilmælt verður. Krøvini til innihaldi í lýsingini eru tí linkaði samsvarandi hesum. Tilmælið er partvís tikið til eftirtektar.

MEGD

MEGD ger í ummælisskrivinum greitt, at við støði í dagliga samskiftinum við limafeløgini kann meginfelagið staðfesta við vissu, at tað er grundleggjandi tørvur á óheftum eftirliti á brekøkinum.

MEGD mælir til, at orðið uttanveltað verður tikið við í § 1, stk. 3, so at tað stendur, at Brekumboðið, umframt at vera óheft, eisini er uttanveltað í virki sínum. MEGD metir, at tað er týdningarmikið, at Brekumboðið bæði er óheft av seráhugamálum, og uttanveltað, og tí ikki er t.d. í felag ella partur í søk, og heldur ikki við øðrum partinum. Landsstýriskvinnan er samd í, at Brekumboðið skal vera óheft og uttanveltað í virki sínum, men skal samstundis vísa á, at sambært samheitsorðabókini hjá Sprotanum eru orðini óheft og uttanveltað samheitið. Mett verður tí ikki, at neyðugt er at nýta bæði orðini í lógartekstinum. Orðið óheft verður mett at vera nóg fevnandi. Tilmælið um broyting er ikki tikið til eftirtektar.

MEGD mælir til, at Brekumboðið verður skipað á so breiðum, fólkaræðisligum og pluralistiskum grundarlagi, sum gjørligt, og at tað sostatt verður Løgtingið, ið fær ábyrgdina av at seta Brekumboðið, við íblástri úr lógini um Løgtingsins umboðsmann. MEGD vísir í hesum sambandi á, at tað hevur grundleggjandi týdning, at Brekumboðið, uttanveltað og óheft, hevur møguleika at úttala seg frítt, og ikki festir røtur í geirahugsan, ella knýtir seg til ein ávísan geira, fram um aðrar. MEGD metir, at um eitt stjórnarráð skal velja Brekumboðið, verður grundarlagið hjá Brekumboðnum at virka, ikki pluralistiskt og breitt á nøktandi hátt.

Almanna- og mentamálaráðið hevur umrøtt, hvørs Brekumboðið er betri staðsett undir Løgtinginum ella landsstýrinum, við umsitingina í Løgtinginum og aðalstjóran í Løgmálaráðnum. Allir partar eru samdir um, at Brekumboðið er betur staðsett undir landsstýrinum.

Í hesum sambandi skal Almanna- og mentamálaráðið vísa á, at tað er sera ymiskt, hvussu lond hava valt at skipa seg í stýrisskipanini, og at tað í hesum føri er neyðugt at taka útgangsstøði í, hvussu Føroyar hava skipað seg. Um vit taka útgangsstøði í valdsbýtinum í Føroyum, er Løgtingið lóggávuvaldið, og hevur eftirlit við útinnandi valdinum, umvegis Løgtingsins umboðsmann og landsgrannskoðanina.

Sambært lógaruppskotinum liggur munandi meira í uppgávuni hjá Brekumboðnum enn at vera ein eftirlitsmyndugleiki, á sama hátt sum stovnar undir Løgtinginum. Brekumboðið skal millum annað vera talurør fyri brekøkið, og skal virka fyri at menna, fremja og betra um umstøður hjá

fólki, ið bera brek. Harvið hevur Brekumboðið ein brekpolitiskan og framlítandi leiklut, og skal gera vart við, hvørjar ábøtur og betranir mett verður, at útinnandi valdið eigur at fremja. Her er talan um útinnandi uppgávur, og metir Almanna- og mentamálaráðið tí, at Brekumboðið er betur staðsett undir útinnandi valdinum.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at Brekumboð hevur eitt minni politiskt og meira pluralistiskt grundarlag, um tað verður sett av Løgtinginum. Siðvenja í Føroyum er, at tílíkar skipanir eru fyrisitingarliga undir landsstýrinum, og mett verður ikki, at tað eru dømir um, at tað eru avbjóðingar við óheftni, orsakað av hesum. Kærustovnurin, Dátueftirlitið og Brúkaraumboðið eru dømir um stovnar, ið verða settir av landsstýrinum, ið síðani virka óheftir, og við fullari armslongd.

Harumframt er umráðandi at hava í huga, at ein setan undir landsstýrinum tryggjar, at Brekumboðið verður fevnt av øllum fyrisitingarligum reglum, og at setanartilgongdin verður sambært setanarpolitikki landsins. Tað er millum annað, at starvið verður lýst leyst, at ein setanarbólkur skal setast, ið er viðkomandi í mun til hvat starv talan er um, og at tann, ið settur verður, skal vera mettur at vera tann best skikkaði út frá sakligum atlitum.

Í mun til eitt Brekumboð, ið ikki skal virka innan *ein* geira, men innan øll økir í samfelagnum, ið eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek, hevur hetta eitt nú við sær, at hóast Brekumboðið formliga hoyrir undir ein geira, skal setanarbólkurin, ið skal seta Brekumboðið, fevna breitt. Mett verður tí, at ein setanartilgongd undir landsstýrinum tryggjar óhefti í nøktandi mun.

Eins og Kærustovnurin, Dátueftirlitið og Brúkaraumboðið, skal Brekumboðið virka óheft, og við fullari armslongd, eftir at tað er sett í starv, eins og ásett er í § 1, stk. 3. Tilmælið er ikki tikið til eftirtektar.

MEGD vísir á, at í øðrum londum eru eftirlitseindir mangan forankraðar í hægri lóg, eitt nú í grundlóg ella stýrisskipan. MEGD vísir í hesum sambandi á, at ynskiligt er, at bæði eftirlitseindir, og mannarættindi, sum heild, verða forankraði í hægri lóg, eitt nú í stýrisskipanarlógini ella í einum mannarættindaskjali, við tí grundgeving, at tað í størri mun krevur semjusøkjan bæði at stovna og broyta hægri lóg. Almanna- og mentamálaráðið vísir í hesum sambandi á, at í Føroyum er siðvenja, at umboð og eftirlitsstovnar hava heimild í vanligari lóggávu. Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at tað eru orsøkir til at broyta hesa siðvenju.

MEGD mælir til, at tillagingar verða gjørdar í nevndini soleiðis, at talið av limum verður økt upp í sjey ella níggju, og at áhugafeløgini á brekøkinum verða betur umboðaði. Tilmælið er partvís tikið til eftirtektar. Sí samlaðu viðgerð av støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið síðst í fylgiskjalinum, undir *Støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið*.

MEGD mælir til, at nevndin fær eitt leysari tilknýti til virksemi hjá Brekumboðnum, og vísir í hesum sambandi á, at um umboð fyri landsstýrið vera í nevndini, skulu hesi sambært París-meginreglunum einans hava ein ráðgevandi leiklut. MEGD ger vart við, at um hildið verður fast í at meirilutin í nevndini kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi, og landsstýrið er umboða í nevndini, hevur landsstýrið beinleiðis ávirkan á Brekumboðið. MEGD metir, at hesin bygnaður kann ávirka, í hvønn mun Brekumboðið fer at at virka sjálvstøðugt og óheft, og at hetta tí er í stríð við París-meginreglurnar.

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi gera greitt, at tað ikki er ætlanin, at starvsfólk í stjórnarráðunum ella kommunustýrislimir eru limir í nevndini. Í serligu viðmerkingunum framgongur, at limirnir í nevndini skulu vera fólk, ið virka á ymsu økjunum,

eins og at best er um hesi hava arbeitt ella arbeiða við fólki, ið bera brek. Fyri at ongi ivi skal vera hesum viðvíkjandi, er broyting gjørd í § 8, stk. 3, ið nágreinar, at starvsfólk í stjórnarráðum og kommunustýrislimir kunnu ikki verða limir í nevndini fyri Brekumboðið. Tilmælið er tikið til eftirtektar.

Viðvíkjandi at meirilutin í nevndini kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi, nágreina serligu viðmerkingarnar, at hetta bert er galdandi um nevndin metir, at Brekumboðið vanrøkir sínar uppgávur ella ber seg at á ein hátt, sum týðiliga minkar um álitið á, at Brekumboðið kann røkja sínar uppgávur til fulnar.

Endamálið við at áseta greitt í lógini, undir hvørjum treytum Brekumboðið kann verða loyst úr starvi, er at tryggja, at starvið hevur eina serliga vernd móti uppsøgn. Harumframt er endamálið at tryggja, at Brekumboðið kann virka sjálvstøðugt og óheft av politisku skipanini, og ikki kann loysast úr starvi fyri at úttala seg um viðurskifti á brekøkinum, ið verða mett, ikki at vera nøktandi, ella fyri at átala politisku skipanina. Fyri at ongi ivi skal vera hesum viðvíkjandi, er broyting gjørd í § 6, ið nágreinar, undir hvørjum treytum, meirilutin í nevndini kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi. Tilmælið er tikið til eftirtektar.

MEGD metir ikki, at lógaruppskotið inniheldur nøktandi ásetingar, ið tryggja Brekumboðnum nøktandi grundarlag at luttaka í altjóða samstarvi, og vísir á, at hesi viðurskifti eiga at staðfestast í lógaruppskotinum, ella tryggjast á annan hátt.

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi gera greitt, at einki í lógini er til hindurs fyri, at Brekumboðið kann samstarva við ST ella luttaka í øðrum norðurlendskum ella altjóða samstarvi. Harumframt verður tað undir fíggjarligum avleiðingum gjørt greitt, at tað verður mett neyðugt, at Brekumboðið hevur eina játtan til ferðakostnað, ið ger tað møguligt at luttaka í altjóða høpi.

MEGD mælir til, at ein góður, atkomuligur og greiður hoyringarleistur verður skipaður millum Brekumboðið og áhugafeløgini, og vísir í hesum sambandi á, at tað er ein grundleggjandi treyt sambært breksáttmálanum, at Brekumboðið tekur áhugafeløg hjá fólki, ið bera brek, við uppá ráð, tá ið tað er neyðugt og viðkomandi.

Almanna- og mentamálaráðið vísir í hesum sambandi til § 3, stk. 2, ið ásetir, at Brekumboðið skal hoyra fólk, ið bera brek, og áhugafeløg á brekøkinum, í sambandi við at Brekumboðið røkir sínar uppgávur. Í serligu viðmerkingunum til § 3, stk. 2 verður hetta útgreinað, og verður tað gjørt greitt, at fólk, ið bera brek, og áhugafeløgini á brekøkinum skulu hoyrast í størst møguligan mun, eins og at Brekumboðið skal gera serligar fyriskipanir, ið tryggja, at fólk, ið hava avbjóðingar við eitt nú at hoyra, tosa, síggja og minnast, eisini vera hoyrd. Viðvíkjandi at skipa ein góðan, atkomuligan og greiðan leist fyri ummælir millum Brekumboðið og áhugafeløgini verður mett, at hesin ikki skal ásetast í lóg. Hinvegin er tað uppgávan hjá Brekumboðnum at gera ein tílíkan leist, tá ið Brekumboðið skipar sítt arbeiði.

MEGD vísir á, at sambært metingini í brotinum um fíggjarligar avleiðingar, í lógaruppskotinum, sum varð sent til ummælis, skulu umleið 1,5 mió. kr. setast av til lønir, 30 tús. kr. setast av til nevndarsamsýningar, og 250 tús. kr. til eingangsútreiðslur, og metir MEGD, at játtanin er ov lítil.

Landsstýriskvinnan skal í hesum sambandi at vísa á, at brotið um fíggjarligar avleiðingar ger greitt, at Brekumboðið harumframt tørvar eina játtan til at framleiða kunningartilfar, gera frágreiðingar og kanningar, skrivstovuhald og annað. Samlaða meting um játtan er tí hægri enn MEGD vísir á. Fyri at ongi ivi skal vera, er teksturin umorðaður hesum viðvíkjandi.

MEGD vísir á, at tað er av stórum týdningi bæði fyri trivna og fakliga støðið hjá starvsfólki, at tey kunnu práta við onnur innan sama fakøki. Tí mælir MEGD til, at Brekumboðið fer at hava skrivstovuhølir í einum felagsskapi við onnur, ið eisini arbeiða við mannarættindum í Føroyum. Landsstýriskvinnan er samd í týdninginum av einum fakligum umhvørvi, men vísir á, at í løtuni er eingin skrivstova í Føroyum, sum burturav arbeiðir við mannarættindum. Um ein mannarættindaeind, ella onnur tílík fyriskipan verður sett á stovn í Føroyum, verður tað upplagt at Brekumboðið fær tilknýti til hesa. Tá lógin er samtykt, verður farið undir at finna hóskandi staðseting. Sí svar til Fíggjarmálaráðið.

MEGD metir, at tað hevði verið ein fyrimunur, um lógaruppskotið áleggur Brekumboðnum at miða eftir at vera ein fyrimynd í mun til atkomu.

Almanna- og mentamálaráðið vísir í hesum sambandi til serligu viðmerkingarnar til § 3, ið nágreina, at atlit skal takast at atkomu í breiðastu merking, harímillum fysiska og talgilda atkomu og annað. Harumframt verður útgreinað í viðmerkingunum til § 3, stk. 1, nr. 2, at Brekumboðið skal tryggja, at kunningartilfar um rættindi, kæru- og klagumøguleikar er sjónligt og atkomuligt, og at tað er umráðandi at tryggja, at atkoma til upplýsingar er so góð sum til ber, og kann hetta eitt nú gerast við, at tilfarið á heimasíðuni verður lisið upp og teknmálstulka.

MEGD metir, at Brekumboðið eigur at hava førleikar og orku til at vegleiða fólk, ið bera brek, um tey ynskja at leggja sak, kæra o.tíl. Almanna- og mentamálaráðið vísir í hesum sambandi til serligu viðmerkingarnar til § 3, stk. 1, nr. 2 og 3, ið ger greitt, at uppgávan hjá Brekumboðnum er at veita kunning og vegleiðing í rættindum og kæru- og klagumøguleikum hjá fólki, ið bera brek, eins og at vísa á hvørjar myndugleikar, tey kunnu venda sær til í hvørjum einstøkum føri. Tað er ikki uppgávan hjá Brekumboðnum at orða kærur ella klagur vegna fólk, ið bera brek, ella at kæra teirra vegna. Tá tørvur er á tílíkari hjálp, kann Brekumboðið vísa til m.a. Rættarhjálpina, Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið, ið vegleiða og hjálpa fólki í ítøkiligum málum.

Umframt omanfyri nevndu tilmælir mælir MEGD til, at miðað verður eftir at søkja um viðurkenning frá altjóða metingarnevndini hjá ST, at Brekumboðið fær ein virknan leiklut, tá ið kreppur raka, at atkomuviðurskiftini til skrivistovuhølini hjá Brekumboðnum eru góð, at Brekumboðið fylgir dagførdum standardum fyri talgilt samskifti, at Brekumboðið hevur eftirlit við, at úrskurðir ella avgerðir hjá dómstólum ella fyrisitingarligum kærumyndugleikum og at hesar verða tiknar til eftirtektar, og at Brekumboðið saman við áhugafeløgunum áhaldandi eigur at virka fyri at menna sokallaðu mannarættindatilgongdina. Landsstýriskvinnan er samd í hesum, men metir tó ikki, at hesi viðurskifti skulu nágreinast nærri í lógaruppskotinum. Einki í ítøkiliga lógaruppskotinum forðar fyri, at hesi viðurskifti kunnu fremjast.

Harumframt kemur MEGD í ummælisskrivinum inn á, at tørvur er á at kanna um kærumál til altjóða brekrættindanevndina krevja eina ávísa fyriskipan millum Føroyar og Danmark, at játtanin til limafeløgini í MEGD er ov lág, at tørvur er á einari langtíðar brekpolitiskari virksiætlan, leiklutin hjá dómstólinum, og at Føroya løgting eigur at skipa fyri aðalorðaskifti um mannarættindi. Mett verður ikki, at hesi viðurskifti eru beinleiðis viðkomandi fyri ítøkiliga lógaruppskotið.

Felagið Hoyr

Felagið Hoyr mælir til, at § 3, stk. 2 verður umorðað, so at tað er greitt, at Brekumboðið skal hoyra fólk, ið bera brek, og áhugafeløg á brekøkinum, og at hetta ikki bert skal gerast í tann mun tað er viðkomandi og møguligt. Tilmælið er tikið til eftirtektar, og teksturin er umorðaður samsvarandi.

Felagið Hoyr metir, at tað sambært lógaruppskotinum er ov lætt at sleppa av við Brekumboðið, ið ger sínar skyldur, av tí at landsstýrisfólkið kann loysa Brekumboðið úr starvi, um meirilutin í nevndini mælir til tess.

Almanna- og mentamálaráðið vísir í hesum sambandi til serligu viðmerkingarnar til § 6, stk. 3 og stk. 4, ið nágreina, at nevndin bert kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi um nevndin metir, at Brekumboðið vanrøkir sínar uppgávur ella ber seg at á ein hátt, sum týðiliga minkar um álitið á, at Brekumboðið kann røkja sínar uppgávur til fulnar. Endamálið við at áseta greitt í lógini, undir hvørjum treytum Brekumboðið kann verða loyst úr starvi, er at tryggja, at starvið hevur eina serliga vernd móti uppsøgn. Harumframt er endamálið at tryggja, at Brekumboðið kann virka sjálvstøðugt og óheft av politisku skipanini, og ikki kann loysast úr starvi fyri at úttala seg um viðurskifti á brekøkinum, ið verða mett, ikki at vera nøktandi, ella fyri at átala politisku skipanina. Fyri at ongi ivi skal vera hesum viðvíkjandi er broyting gjørd í § 6, ið nágreinar, undir hvørjum treytum meirilutin í nevndini kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi. Tilmælið er tikið til eftirtektar. Sí svar til MEGD.

Hoyr metir ikki, at tað er í samsvari við París-meginreglurnar, at umboð fyri stjórnarráð eru í nevndini, tá ið meirilutin í nevndini kann mæla til, at Brekumboðið verður loyst úr starvi.

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi gera greitt, at tað ikki er ætlanin at starvsfólk úr stjórnarráðum ella kommunustýrislimir eru limir í nevndini. Fyri at ongi ivi skal vera hesum viðvíkjandi, er broyting gjørd í § 8, stk. 3, ið nágreinar, at starvsfólk í stjórnarráðum og kommunustýrislimir kunnu ikki verða limir í nevndini fyri Brekumboðið. Tilmælið er tikið til eftirtektar. Sí svar til MEGD.

Hoyr metir, at brekøkið hevur ov lítla umboðan í nevndini, og mælir til, at nevndin verður umskipað soleiðis, at hon í størri mun umboðar og kennir til brekøkið, og ikki mannarættindaøkið í síni heild. Um hildið verður fast í, at nevndin hevur breiða umboðan í samfelagnum, verður mælt til, at tveir limir umboða brekøkið, harav forfólkið í MEGD er føddur limur. Tilmælið er partvís tikið til eftirtektar. Sí samlaðu viðgerð av støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið síðst í fylgiskjalinum, undir *Støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið*.

Landsfelag Pensjónista

Landsfelag Pensjónista tekur undir við uppskotinum, og fegnast um, at eldraøkið er umboða í nevndini fyri Brekumboðið.

Landsfelag Pensjónista metir, at orðingin í § 8, stk. 4 (tá § 8, stk. 3) kundi verið orðað eitt sindur greiðari fyri at ongin misskiljing skal verða, nær nýggir limir verða valdir. Skotið verður tí upp at seta orðini "eftir hetta verða" inn í ásetingina, ið síðani hevði verið soljóðandi: *§ 8. stk. 4. Limirnir verða settir fyri fýra ár ísenn. Eftir hetta verða ávikavist tríggir og tríggir limir valdir annað hvørt ár.*

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at núverandi orðing er ógreið. Gjørligt er ikki at allir limirnir sita í eitt fýra ára tíðarskeið fyrstu setu, av tí at helvtin av nevndini skal veljast annað hvørt ár. Neyðugt er tí at velja helvtina av liminum fyri eitt tvey ára tíðarskeið, og hina helvtina fyri eitt fýra ára tíðarskeið, fyrstu ferð at nevndin verður mannað. Hetta er fyri at fyribyrgja, at nakar limur situr í seks ár, ið verður mett at vera ov leingi. Uppskot til broyting verður ikki tikið til eftirtektar. Í serligu viðmerkingunum er tó nágreinað hvussu nevndin verður sett í fyrstu setu.

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við yvirskipaða endamálinum við lógini, men mælir til at umhugsa, at Brekumboðið verður partur av einum øðrum stovni, av tí at tað er hugsandi, at fíggjarligir fyrimunir eru av t.d. felags fyrisiting, mannagongdum og royndum.

Landsstýriskvinnan skal í hesum sambandi at vísa á, at talan ikki verður um ein nýggjan stovn. Brekumboðið verður skipað, sum ein sjálvstøðug eind, og verður skrivstovuhaldið hjá eindini skipað í hóskandi samstarvi við ein verandi stovn ella líknandi. Sí svar til Fíggjarmálaráðið.

Lærarafelagið og Pedagogfelagið

Lærarafelagið og Pedagogfelagið mæla til, at ásetingin í § 3, stk. 1 verður víðkað soleiðis, at heimsmálini hjá ST, sum viðvíkja trivnað, heilsu og útbúgving, verða skrivað beinleiðis inn í lógina.

Landsstýriskvinnan er samd í, at trivnaður, heilsa og útbúgving eru umráðandi økir, og eru hesi partur av virkisøkinum hjá Brekumboðnum. Tað er til eina og hvørja tíð uppgávan hjá Brekumboðnum at avgera hvørji fokusøkir Brekumboðið raðfestir. Mett verður ikki at ávís økir skulu lóggevast fram um onnur. Tí verður uppskotið til broyting ikki tikið til eftirtektar.

Lærarafelagið og Pedagogfelagið meta, at eitt umboð í nevndini átti at verið markað til skúla- og dagstovnaøkið. Tilmælið er partvís tikið til eftirtektar. Sí samlaðu viðgerð av støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið síðst í fylgiskjalinum, undir *Støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið*.

Sosialráðgevarafelag Føroya

Sosialráðgevarafelag Føroya fegnast um lógaruppskotið, og at stremba verður eftir at tillaga okkum til sáttmála Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Felagið tekur undir við lógartekstinum, soleiðis, sum hann er orðaður. Felagið mælir samstundis til at nágreina § 8 og viðmerkingarnar til greinina, soleiðis at tað verður positivt tilskilað, at limirnir í nevndini, ið umboða almannaøkið, eru sosialráðgevarar.

Landsstýriskvinnan er samd í, at sosialráðgevarar eru ein viðkomandi starvsfólkabólkur at hava í huga, tá ið limir vera tilnevndir í nevndina. Mett verður samstundis, at aðrir starvsfólkabólkar á almannaøkinum eisini eru skikkaðir. Tí verður uppskotið um broyting ikki tikið til eftirtektar.

Støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið

Fleiri hoyringspartar hava viðmerkingar til støddd og samanseting av nevndini fyri Brekumboðið.

Kommunufelagið metir, at samansetingin av nevndini fyri Brekumboðið eigur at verða broytt soleiðis, at kommunurnar hava eitt fast umboð í nevndini, og vísir í hesum sambandi á, at kommunurnar eru næststørsti arbeiðsgevarin í Føroyum, umsita dagstovna- og eldraøkið, hava nógv borgarasamskifti og standa fyri stórum parti av tí bygging, ið so ella so er ætlað almennari nýtslu.

MEGD mælir til, at tillagingar verða gjørdar í nevndini soleiðis, at talið av limum verður økt upp í sjey ella níggju, og at áhugafeløgini á brekøkinum verða betur umboðaði.

Felagið Hoyr metir somuleiðis, at brekøkið eigur at verða betur umboðað í nevndini og mælir til, at nevndin verður umskipað soleiðis at hon í størri mun umboðar og kennir til brekøkið, og ikki mannarættindaøkið í síni heild. Um hildið verður fast í at nevndin hevur breiða umboðan í samfelagnum, mælir Hoyr til at tveir limir umboða brekøkið, harav forfólkið í MEGD er føddur limur.

Harumframt mæla Lærarafelagið og Pedagogfelagið til at eitt umboð í nevndini verður markað til skúla- og dagstovnaøkið.

Landsstýriskvinnan hevur viðgjørt øll ynskir um broyting, og er partvíst ella heilt samd við hoyringspørtunum. Landsstýriskvinnan hevur tí tikið avgerð um at økja talið av limum úr fimm upp í sjey, og at broyta samansetingina av nevndini soleiðis, at forfólkið í MEGD er fastur limur, og hinir limirnir umboða løntakarar, arbeiðsgevarar, kommunurnar, almannaøkið, heilsuøkið og skúlaøkið.

Viðvíkjandi ynski um, at brekøkið er betur umboðað, hevur landsstýriskvinnan valt at halda fast í, at áhugafeløgini hava eitt umboð, ið er forfólk í MEGD, og at nevndin annars er umboða av limum, sum saman hava eina breiða samfelagsumboðan, og hava eina vitan um tey økir í samfelagnum, har fólk, ið bera brek, virka og skulu rúmast. Fyri at tryggja, at limirnir hava kunnleika til brekøkið, er ásett, at umboðini skulu hava innlit í viðurskifti, sum serliga eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek. Harumframt er nágreinað í viðmerkingunum til § 8, at best er, um limirnir hava arbeitt ella arbeiða við fólki, ið bera brek, ella viðurskifti á brekøkinum. Mett verður tí, at nevndin saman umboðar og kennir brekøkið, og tey økir og viðurskifti í samfelagnum, ið eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek.

Umframt nevndina er ásett, at Brekumboðið skal hava góðan kunnleika til viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek, og skal í øllum sínum virksemi í størst møguligan mun, hoyra fólk, ið bera brek, og áhugafeløg á brekøkinum. Sostatt verður mett, at brekøkið er nøktandi umboða.